# Óvanligur fiskiskapur

Teir seinastu dagarnar hava garnabátar fingið óvanliga nógvan fisk úti fyri Vardø í Noregi. Tað sjáldsama er, at bátarnir fáa at kalla bara tosk, og tað er púra óvanligt hesa tíðina á árinum, skrivar Fiskaren. Ein maður, sum hevur rikið fiskiskap á Vardø-leiðini seinastu 10 árini, sigur við blaðið, at hann hevur ongantíð vitað um nakað slíkt áður um hesa tíðina. Tað vanliga er, at bátarnir fram við Finnmarksstrondini plaga at leggja um til línu um hesa tíðina, men lívið í sjónum er ikki, sum tað plagar at viera, skrivar Fiskaren.






*- Truplu umstøðurnar gera, at summir fiskimenn hótta við at fara heimaftur, og tað eru eisini teir, sum longu eru farnir, siga Carl Kristiansen og Jónas Sigmarsson á Crew*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Orsøkin er snøgt sagt permanenta p-talið, sum tey ikki fáa, fyrr enn tey hava fingið formella uppihalds-og arbeiðsloyvi í Føroyum og harvið eitt »klistrimerkið«, sum løgreglan setir í passið.

Men hvar liggur so tann stóri trupulleikin, og hvussu kann málið loysast?

## Yppa øksl

Sum vit nevndu tíðliga í greinini, skal forhondsgóðkendi arbeiðsgevarin, sum hevur tikið fólk heim til Føroya at arbeiða, søkja Udlændingeservice í Danmark um arbeiðs-og uppihaldsloyvi til síni arbeiðsfólk og fiskimenn.

- Vit lótu okkara fyrstu umsóknir eftir broyttu lógini inn longu 6. august í ár, men enn hevur eingin teirra fingið svar upp á nakað sum helst. Tað er góðkenningin hjá Udlændingeservice, sum gevur hesum fólkum nøktandi viðurskifti, men tað hevur bara tikið so ógvuliga langa tíð at bíða eftir hesi góðkenning.

Carl og Jónas skera út í papp og siga, at tað er ikki fyrr enn henda góðkenning er komin úr Danmark, at útlendsku arbeiðsfólkini eftir broyttu lógini kunnu flyta sína adressu til Føroya, soleiðis at tey kunnu virka undir vanligum viðurskiftum eins og okkara egnu borgarar.

- Vit hava roynt at »ruggað bátin« við at tosa við TAKS, Útlendingastovuna og Landsfólkayvirlitið, um ikki ein einfaldari loysn kann finnast, meðan bíðað verður eftir Udlændingeservice. Hetta førdi til, at stovnarnir høvdu ein fund saman fyri at viðgera henda stóra trupulleika. Crew royndi at sleppa við á fundin fyri at lýsa trupulleikan frá teirri síðuni, sum stovnarnir ikki kenna so væl, men hetta læt seg ikki gera.

Crew hevur tó skilt, at úrslitið av felags fundinum sambært Útlendingastovuni er ein samandráttur, sum er latin Innlendismálaráðnum.

- Vit hava roynt at fregnast eftir, hvat kanska fer at henda, so korini hjá útlendingum í Føroyum kunnu batna, men svarið, vit higartil hava fingið, er, at best man vera at trýsta á donsku Udlændingeservice fyri at fáa tey at viðgera umsóknirnar skjótari.

Men Carl og Jónas halda, at hetta bara er ein lættur máti hjá stovnunum at sleppa sær undan ábyrgd.

- Øll, sum hava tikist við útlendingamál, vita, at Udlændingeservice ikki letur seg trýsta. Tey siga, at tey eru nógv undirmannað. Ein kvinna, sum arbeiðir har, segði, at bert tvey fólk arbeiða við hesum – og at viðgerðin nóg illa er byrjað, siga teir.

## Egnan barm

Crew sigur, at fyri tey, sum arbeiða við at taka útlendingar heim til Føroya at arbeiða, er bert ein loysn í ljósmála í løtuni.

- Loysnin er, at vit í Føroyum taka í egnan barm. Vit mugu taka okkum saman og loysa henda trupulleika, sum hevur stungið seg upp við broyttu útlendingalógini.

Carl og Jónas siga, at loysnin er at fáa Landsfólkayvirlitið at geva hesum fólkum eitt permanent p-tal beinanvegin, tí hesi fólk gjalda jú alt, tey skulu heilt frá fyrsta degi, tey eru her.

- Sjálvandi eigur Taks, sum annars hava verið hjálpsom í slíkum viðurskiftum, eisini at seta útlendingarnar í rættan skattabólk beinanvegin.

Teir halda, at skuldi tað seinni víst seg, tá Udlændingeservice umsíðir hevur viðgjørt einstøku umsóknirnar, at onkur umsókn ikki verður gingin á møti, kunnu hesi fólk sendast heimaftur. Tað er ikki verri enn tað.

- Í teirri longu tíðini, sum ein slík viðgerð tekur, kann persónurin so hóast alt hava virkað sum ein vanligur skattaborgari hesa tíðina – í staðin fyri sum nú, har hesi fólk meira ella minni eru vorðin annanfloks borgarar í Føroyum – við ongum rættindum, bert skyldum, siga Carl og Jónas.

## Skulu siga »da«

Teir vísa á, at Udlændingeservice eftir øllum at døma eisini er farið at gera umstøðurnar uppaftur truplari, enn tær longu eru.

- Nú krevja tey í donsku umsitingini, at eitt nú navngivnu polakkarnir, sum vit ringja fyri, skulu sita við síðuna av okkum og siga da (ja), tá vit tosa við Udlændingeservise. Hetta ger ikki uppgávuna, sum frammanundan er torfør og tyngjandi, lættari.

Teir eru samdir um, at eingin hevði droymt um, at trupulleikin skuldi gerast so stórur við at fáa góðkenningina úr Danmark, nú vit endiliga høvdu fingið eina broytta og á pappírinum meira librala útlendingalóg fyri borgarar úr ES-londum.

- Vit hava so eingi svar fingið enn, og líkt er til, at føroyski myndugleikin bara hevur sett seg aftur á at bíða, samstundis sum vit hava fingið fólk heim at arbeiða, sum ikki kunnu hava eitt sømiligt lív. At síggja til, halda føroyskir myndugleikar fram eins og áður at skúgva útlendingamálið frá sær.

Carl og Jónas halda, at tað minsta, sum man eigur at kunna vænta av føroysku myndugleikunum, er, at tey síggja trupulleikan og kunnu verða við til at loysa hann, so hesi fólk ikki framhaldandi skulu liva sum annan floks borgarar í Føroyum.

- Tað stutta av tí langa er, at eingin, sum vit hava fingið heim til Føroya undir broyttu lógini, enn er sloppin at flyta adressu heim til Føroya, og harvið hava hesi fólk heldur ikki fingið lut í teimum skipanum, sum samfelagið hevur. Kortini eru tey so skjótt, tey byrjaðu at arbeiða, vorðin ein partur av føroyska samfelagnum – við teimum skyldum, sum allir løntakarar hava, siga teir.

## Crew var fyrst

Sp/f Crew var fyrsta føroyska fyritøkan, sum fekk forhondsgóðkenning til at taka fólk heim eftir broyttu útlendingalógini.

Teir vænta, at einar 150-200 umsóknir soleiðis liggja í Udlændingeservice, sum bíða eftir danskari góðkenning.

- Vit hava stórar ætlanir við okkara felag, og Føroyar skuldu ætlandi bert verða ein lutfalsliga lítil partur av okkara virksemi. Nú mugu vit renna frá Hanusi til Janus fyri at hjálpa hesum fólkum ymsastaðni í skipanini, og vit hava enntá verið á skaðastovuni við fólkum, sum ikki sleppa til ein kommunulækna.

Carl Kristiansen og Jónas Sigmarsson eru avgjørdir um, at Føroyar sum samfelag eiga at standa saman um at loysa henda trupulleika alt fyri eitt.

*»Nú mugu vit renna frá Hanusi til Janus fyri at hjálpa hesum fólkum ymsastaðni í skipanini, og vit hava enntá verið á skaðastovuni…«*
*(Carl og Jónas)*



*- Tað stutta av tí langa er, at eingin, sum vit hava fingið heim til Føroya undir broyttu lógini, enn er sloppin at flyta adressu heim til Føroya, siga Carl Kristiansen (v.m.) og Jónas Sigmarsson frá fyritøkuni Crew, sum bjóða útlendska arbeiðsmegi*
*Mynd: Jens Kr. Vang*